# Íslendskt sáð til Noregs

Fyri fyrstu ferð hava norskir seyðabóndur innflutt sáð undan íslendskum veðrum. Íslendska blaðið Vísir skrivar, at í fyrsta umfari hava teir norsku bóndurnir keypt sáð, sum er nóg mikið til 540 ær. úr íslenskum hrútum. Sáðið varð keypt fryst frá einari ísáðingarstð á Suðurlandinum. Norðmenn brúka tað íslendska veðrasáðið til kynsbótararbeiði víða um landið. Samstarvið millum íslendingar og teir norsku bóndurnar um kynsbótararbeiði byrjaði fyri sjey árum síðani, skrivar Vísir.





*Gunnar Axén er svenskur ríkisdagslimur fyri Moderaterna*

# Pensjónsreformur spart 30 milliardir

**Svenski politikarin fyri Moderaterna, Gunnar Axén, greiddi á landsfundi Fólkafloksins frá nýggju pensjónsskipanini, ið varð sett í gildi í Svøríki í 2006.**

LANDSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Talan er um tríggjar vælferdnaðar reformar, pensjónsreformin, sjúkratrygging og vegurin aftur frá fyritíðarpensjón

Í Svøríki vóru tríggjar pensjónir, ein almenn, ið er taldi 74%, ein avtalupensjón, sum er ein avtala millum arbeiðsgevarar og fakfeløg, ið telur 19% og ein privat á 7%.

Gamla skipanin kom í gildi í 1960 og bygdi á viðurskiftini, ið tá vóru. Men hesi broyttust serliga í 70-unum og 80-unum, tá búskaparvøksturin minkaði og barnatalið hjá familjunum broyttist.

Talan var um eina pay as you go skipan, ið bygdi á óverulig fíggjarlig viðurskifti. Og tá komið var fram til 2015 fór skipanin ikki at virka meira.

Teir fýra borgarligu flokkarnir saman við javnaðarflokkinum standa aftan fyri nýggju skipanina, og tað er meiri enn 80% av svenska Ríkisdegnum.

Nýggja pensjónsskipanin verður fíggjað uttan fyri svensku fíggjarlógina. 18,5% verður fíggjað umvegis lønina, tó bert upp til eina inntøku á 30.000 svenskum krónum. Harav fara 2,5% til ein pensjónsfond.

## Avmarkað sjúkramelding

Støddin á pensjónini kemur frá

- Øllum lívsinntøkunum
- Fíggjarligu og demagogisku menningini
- Nær pensjónin verður tikin út (tó ikki fyrr enn 61 ár)

Úrslitið er heimsins mest støðuga pensjónsskipan, sigur Gunnar Axén.

Ein týðandi broyting var at avtaka sjálvvirkandi fyritíðarpensjónina hjá fólki, tá tey høvdu verið sjúkrameldað í eitt ár. Ein onnur týðandi broyting er, at fólk fáa ikki automatiskt sjúkrapengar, men bert í tann mun tey ikki megna at arbeiða.

Eftir trimum mánaðum sum sjúkrameldað fáa fólk bert sjúkrapening, um tey ikki kunnu gera annað arbeiði á sínum arbeiðsplássi, og eftir hálvum ári verður hetta víðkað til onnur arbeiði í økinum.

Tað ber ikki til at vera sjúkrameldaður í fleiri enn 914 dagar, tá ber ikki til longur at fáa sjúkrapening. Tá verða fólk send til arbeiðsávísningina, ið skal finna arbeiði til fólk, ella at endurbúgva tey.

## Færri fyritíðarpensjónistar

Áður hevur eingin tíðaravmarking verið á longdini á sjúkrameldanini. Bert tá allir møguleikar eru troyttir, fáa fólk fyritíðarpensjón.

Broytingin hevur skorið sjúkradagarnar niður í helvt, eins og talið á fyritíðarpensjónistum er lækkað við 10%, og hetta hevur merkt eina sparing á 30 milliardir krónur seinastu trý árini frá oktober 2006 til oktober 2009.

Fyrr fyritíðarpensjóneraðust 140 fólk um dagin í Svøríki, meðan talið nú er munandi lægri.

Munurin á at fáa sjúkrapening ella fyritíðarpensjón og at arbeiða er somuleiðis vaksin í Svøríki. Fyrri var lítil og eingin munur á tí, fólk fingu.

Fyritíðarpensjónistar kunnu forvinna upp til 43.000 krónur um árið uttan at tað ávirkarpensjónina, men omanfyri tað verða 50 oyru afturhildin í pensjónini fyri hvørja krónu, ið verður forvunnin.

# Búskaparligt kjak

**Á landsfundinum helt Thomas Dam, formaður í Búskaparráðnum, fyrilestur undir heitinum » Fíggjarpolitikkurin má aftur á beint nú«.**

Hóast fíggjarkreppu, hava vit gott útgangsstøði, við lítlari skuld, bæði almennt og privar. Og so hevur almenni sektorurin verið við til at stuðla upp undir alla tíðina. ALS rindar meiri út, tá tíðirnar eru ringar, so tað almenna er við til at javna út ringu tíðirnar.

Hinvegin hevur gongdin seinastu árini verið skeiv, og almenni sektorurin er øktur eini 80% síðani 2000. Danir hava hinvegin megnað at hildi aftur so almennu lønarútreiðslurnar eru minni enn inntøkurnar.

Tað er ikki bert kreppan, ið gevur undirskotið. Búskaparfrøðingar eru ikki á einummáli um, hvussu stóran mun hon ger, men Thomas Dam metir, at um helvtin er á einari góðari leið. Hann vísti á, at góðu árini 2006 og 07 høvdu vit bert eitt yvirskot á 150 milliónir, sum er alt ov lítið.

Tað er eingin vanlukka at hava undirskot á fíggjarlógini, men vit mugu hava yvirskot og undirskot, ið hanga saman yvir tíðina, og tað hava vit ikki havt.

Thomas Dam segði, at vit mugu minnast til, at vit eiga ikki allar inntøkurnar, tá tíðirnar eru góðar, og ávaraði ímóti at hækka útreiðslurnar tá.

## Høgan skatt

Somuleiðis ráddi hann frá at økja um almennu tænasturnar, tá tíðirnar eru góðar, tí tað er ógjørligt at taka tær av aftur, tá tíðirnar versna.

Landskassin hevur síðani 2000 hækka sínar útreiðslur støðugt, meðan inntøkurnar eru lækkaðar. Og tað ber ikki til at hækka útreiðslurnar javnt, meðan inntøkugrundarlagið minkar, vísti Thomas Dam á.

Vit liggja ógvuliga høgt í almennum útreiðslum í mun til londini rundan um okkum. Skattatrýstið í Føroyum lægri enn í Danmark og Svøríki, men hægri enn í Noregi og Íslandi. Marginalskatturin í Føroyum ógvuliga høgur.

Formaðurin í Búskaparráðnum legði eisini dent á, at vit hava eina serliga stóra avbjóðing, tá vit vilja veita tænastur, tí vit eru ikki størri enn ein lítil danskur provinsbýur.

Eftir fyrilesturin var høvi at seta spurningar, og tað skapti eitt sunt kjak millum vælmøtta fundarfólkið.

*Thomas Dam, formaður í Búskaparráðnum*

